BOYS IN A BAND

# Tokið koyrir við fullari ferð



Boys In A Band er tiltiknir fyri sínar lívligu framførslur, og úti í heimi hava fólk eisini verið hugtikin av føroyska rockbólkinum. Í 2007 vunnu Boys In A Band altjóða kappingina Global Battle Of The Bands, og bólkurin hevur eisini spælt á Roskilde Festivalinum, Spot, Airwaves í Íslandi og aðrstaðni. Alt byrjaði í september mánaði í 2006, og sama ár vóru Boys In A Band valdir til Besta nýggja bólk á Planet Awards. Árið eftir vóru avrikini so sannførandi, at bólkurin varð valdur til Besta bólk á sama tiltaki.

Í fjør spældu Boys In A Band sína fyrstu fløgu inn. Hetta gjørdu teir saman við kendum framleiðara í studio í London. Burturúr kom útgávan Black Diamond Train, sum varð givin út í fjørsummar.

Og nú skulu Boys In A Band eisini spæla á landsins størsta tónleikatiltaki.



MOBY THE PINK PILOT

# Progressivt og erligt

Moby The Pink Pilot er rættiliga nýggjur bólkur á føroyska tónleikapallinum. Bólkurin var við í tónleikakappingini FM08 og vann hesa kappingina.

Moby The Pink Pilot spælir progressivan rock og fær íblástur frá bólkum sum Pink Floyd, Radiohead og Muse.Bólkurin leggur dent á góð løg og at hava sterkar tekstir. Í sangunum hjá bólkunum eru altíð ein hjartanemandi søga, ein boðskapur ella brutal erligheit.

Bólkurin er mannaður soleiðis:

Fróði Hansen - Sang og trummur
Mattias Kapnas - Orgul
Petur W. Háberg - Bass og sang
Bartal Augustinussen - Gittar

ANFINN & CO

# Slagarabrakið



Anfinn & Co hava givið fleiri útgávur út, og seinsta fløgan kom í fjør. Hendan fløgan varð tikin upp úti í Nólsoy, har klaksvíkingurin Anfinn Nielsen hevur búð í nógv ár.

Tað eru tvey ár, síðani Anfinn & Co høvdu sína tiltiknu framførslu á Summar Festivalinum. Tá vóru teir rendir upp á stóra pallin, tí veðurlíkindini forðaðu útlendskum bólkum at koma til landið til tíðina. Og tað var vorðið sum framførsla, Anfinn og hansara menn høvdu framman fyri lívligu áhoyrarafjøldini.

Nú eru Anfinn & Co til reiðar at taka enn eitt tørn á Summar Festivalinum, og tað gera teir við nýggjum og góðum gomlum sangum.

- Eg gleði meg ótrúliga nógv til at sleppa at standa á pallinum aftur, sigur Anfinn Nielsen, sum er klárur at tríva í slagarar sum Cirkus Tinganes, Útsalg, Stikk hann í kavan, Ferðaseðil til Nólsoyar og Í skúrið.

SJÚRÐUR OG ÓLAVUR

# Frásøgumenn í toppformi





Ein góður festivalur hevur brúk fyri góðum frásøgufólkum á pallinum. Undanfarin ár hava víst, at Summar Festivalurin hevur fatur í tveimum av teimum bestu – og teir halda fram.

Sjúrður Skaale verður aftur í ár frásøgumaður á stóra pallinum á Vágsbøi, og í Flagstjaldinum verður tað Ólavur Klakk – ella skuldu vit sagt Ólavur Presley – sum fer at presentera bólkarnar.

Teir báðir hava á undanfarnu festivalum verið í toppformi, og teir eru fúsir at taka eitt tak afturat á Føroya størsta festivali.